

www.oljan.fo

**Jan Müller** 03 - 02 - 2012

# Grønland eigur ikki at dúva upp á oljuna

Fleiri ímynda sær Grønlandi sum eina komandi oljutjóð, men tað er als ikki nakað gott hugskot. Tað sigur í hvussu er Minik Rosing, sum starvast á Statens Naturhistoriske Museum sum professari í jarðfrøði. Sjálvur hevur hann fleiri onnur uppskot um, hvørjum tað grønlendska samfelagið skal liva av í framtíðini. Higartil hevur oljuleitingin við Grønland ikki givið nakað úrslit, men Minik Rosing sigur, at hetta skulu grønlendingar als ikki harmast um. -Skal Grønland menna seg sum ein sjálvstøðug tjóð á ein hátt, sum grønlendingar virðismeta, so er tað neyvan serliga heppið, um vit knappliga fáa eitt stórt oljuævintýr. Tað hava vit sæð aðrastaðni í heiminum. Tað er heldur lætt at vera ein lítil sjálvstøðug tjóð við ógvuliga nógvari olju, sigur Minik Rosing við Politiken. Hann heldur, at grønlendingar eiga at leggja dent á heilt onnur øki, nú veðurlagsbroytingarnar hava so nógvar broytingar við sær. -Tað hevði verið munandi lættari at lagt dent á eitt nú lokala námsvinnu. Eitt annað hugskot er at byggja samferðsluhavnir í sambandi við tær arktisku sjóleiðirnar, sum fara at fáa størri og størri týdning. Ella kanska loðstænstur, bjarging á sjónum og tænastur sum heild. Hetta eru øki, sum grønlendingar hava førleika til, og sum hóska til tann grønlendska gerandisdagin og samfelagsbygnaðin, sigur Minik Rosing, professari.